# Brandur Enni bjóðar Danmark av

**Týsdagin varð nýggja fløgan hjá Brandi Enni løgd fyri danska almenningin, og hann roynir seg nú av álvara uttan fyri landoddarnar. Unglingurin av Tvøroyri hevur nú tikið tey fyrstu fetini uttan fyri grulvigarðin í Føroyum. Sjálvur vónar hann, at fløgan fer at selja væl í Danmark**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

**Keypmannahavn:** Týsdagurin var ein merkisdagur innan føroyska tónleikaheimin. Unga føroyska stjørnuskotið Brandur Enni var henda dagin á gøtuni við eini nýggjari fløgu, sum er ætlað danska marknaðinum.

Í sambandi við útgávuna hevði plátufelagið Name, sum stendur fyri útgávuni, skipað fyri konsert í stásiligu hølunum Palads mitt í Keypmannahavn. Øll áhugað vóru vælkomin.

Brandur sang nakrar av sangunum á nýggju fløguni. Eisini sang íslendska gentan Jóhanna Guðrún ein sang saman við Brandi. Harumframt sang Guðrun Sólja Jacobsen av Tvøroyri, sum í løtuni er við í kappingini Stjerne for en aften á DR.

Brandur Enni er entertainari burturav, og hóast sín ungan aldur sæst týðuliga, at hann er vanur at standa á palli. Hann megnaði saman við einum væluppløgdum James Olsen at fáa lív í áhoyrarafjøldina, sum fyri tað mesta taldi heilt ung fólk. Genturnar skríggjaðu, og fólk veipaðu við ørmunum í tí stúgvandi fulla biografsalinum.

Byrjað varð við einum dokumentarfilmi, har áskoðarin fekk innlit í gerandisdagin hjá Brandi, og hvussu tað er at arbeiða við upptøkum í studio og videoløgum. Síðani varð farið til tónleikin, har Brandur gav áhoyrarunum ein forsmakk uppá júst útgivnu fløguna.

## Væl nøgdur

- Hatta var super. Hetta er fyrstu ferð, at eg havi framført í Danmark, og tað er eitt sindur øðrvísi enn í Føroyum og Íslandi, sigur Brandur, sum er væl nøgdur við útgávuna sum heild.

- Tað tekur langa tíð hjá einum og hvørjum tónleikara at finna sín rætta sound, men eg eri nøgdur við úrslitið, og vónandi verður hetta ikki tann seinasta fløgan, sigur hann.



*Nýggj fløga við Brandi Enni er komin í fløguhandlar í Danmark. Henda útgávan man vera tann størsta tónleikaliga verkætlanin, sum føroyingar hava latið úr hondum, og plátufelagið hevur lagt nógv fyri. Týsdagin hevði Brandur konsert í Palads í Keypmannahavn, og biografsalurin var fullur av fólki*
*Mynd: Bárður Eklund*



*Íslendska Jóhanna Guðrún sang saman við Brandi í Palads týsdagin. Eisini Guðrun Sólja Jacobsen, sum er við í »Stjerne for en aften« sang, sang fyri teimum mongu áhoyrarunum*
*Mynd: Bárður Eklund*

Meðan vit standa og práta í gomlu jarnbreytarstøðini í Keypmannahavn, sum nú er biografhøli, kemur ein ung genta og spyr um autograf. Eisini vil hon hava eina mynd tikna av sær og Brandi. Hetta er nærum gerandiskostur hjá tí vælumtókta dronginum av Tvøroyri, og hendan hepna gentan fær enntá eitt klemm.

- Eg haldi, at fløgan hevur neyðugu góðskuna, so at hon kann standa seg millum allar hinar her niðri í Danmark, og eg vóni eisini, at hon fer at selja væl, heldur hann fram, eftir at samrøðan varð órógvað eitt lítið bil.

Tað seinasta lagið hevur Brandur sjálvur gjørt orð og lag til, og hetta eru fyrstu ferð, at eitt av hansara egnu løgum er givið út.

- Tað er umráðandi eisini at gera okkurt sjálvur, og man verður meira viðurkendur sum tónleikari. Lagið er tó ikki við á fløguni, bara tí at eg havi skrivað tað, leggur hann dent á. Og hann hevur ætlanir um at skriva enn fleiri sangir sjálvur. Brandur spælir frammanundan trompet og klaver.

## Rødd í broyting

Brandur er 13 ára gamal og gongur í 7. flokki. Nakað, sum kann geva Brandi trupulleikar, er, at rødd hansara er í broyting.

- Eg haldi ikki, at tað er nakar trupulleiki, at røddin er broytt, síðan mína seinastu fløgu. Eg klári ikki líka høgar tónar longur, men røddin er hinvegin blivin sterkari, greiðir hann frá.

Tað nervar sostatt ikki sangaran, at røddin ikki er hin sama longur, og góðskan á tónleikinum versnar ikki av hesi orsøk, munnu tey flestu vera samd um.

## Mainstream

Fløgan hevur trettan skeringar, og allir sangirnir eru á enskum. Átta av sangunum vóru eisini á tí fyrstu fløguni, sum nevndist Waiting in the Moonlight. Allir teir føroysku sangirnir á tí fyrru fløguni eru sáldaðir frá, og fimm nýggir sangir á enskum eru tiknir við ístaðin.

Tónleikurin kann best lýsast sum mainstream popptónleikur, sum kann fanga nógvar av teimum ungu lurtarunum.

Brandur hevur eisini fingið nøkur av teimum størstu nøvnunum innan tónleik í Føroyum at hjálpa sær við fløguni. Eitt nú hevur Óli Poulen ljóðblandað øll løgini, og Niclas Johannesen hevur eisini smíðað fýra av løgunum og verið við til at framleitt okkurt teirra. Hesi nøvnini skuldu borga fyri góðsku, tá talan er um tónleik.

## Morgunsjónvarp og barnasending

Nú verður so roynt at promota fløguna niðri í Danmark, og í hesum sambandi var Brandur við í barnasendingini hjá Bubber seinasta sunnudag. Har sang hann nakrar sangir og prátaði annars við vertin. Hetta er aðru ferð, at Brandur er við í hesi sendingini.

Hósmorgunin skuldi Brandur so vera við í morgunsendingini hjá TV 2, har prátað verður við fólk um leyst og fast. Hetta verður vónandi við til at økja um áhugan fyri fløguni hjá Brandi, og at fleiri fjølmiðlar fara at vísa honum ans. Komandi dagarnar fer Brandur at hava nakrar smærri framførslur kring Danmark í handilsmiðstøðum og aðrastaðni, har fólk savnast.

Plátufelagið hevur eisini fingið eina danska kvinnu, sum hevur góð sambond innan fjølmiðlaheimin, at hjálpa Brandi fram á leiðini, og vónandi kann hon lata fleiri stongdar hurðar upp.

Spennandi verður at síggja, hvussu henda fløgan verður móttikin í Danmark. Komandi vikurnar og mánaðirnir verður greitt, um Brandur eisini kann kveikja ein loga í dønum, eins og hann hevur gjørt í mongum føroyingi.

Stigtakarin Steintór Rasmussen:

# Brandur hevur formatið

**Ein av stigtakarunum aftan fyri fløgurnar hjá Brandi Enni er Steintór Rasmussen. Hann ivast ikki í, at Brandur hevur formatið og nú verður spennandi at síggja, hvussu danir fara at taka ímóti nýggju fløguni**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

**Keypmannahavn:** – Eg eri rættiliga væl nøgdur við tað endaliga úrslitið, hóast okkurt møguliga kundi verið eitt sindur betri og øðrvísi. Samanumtikið er hetta ein góða fløga, sum kann standa seg á einum størri marknaði, heldur Steintór Rasmussen, sum er ein av høvuðsmonnunum aftan fyri útgávurnar hjá Brandi Enni.

Hann heldur, at sangarin hevur formatið at standa seg uttanlands, men tann stóri spurningurin er nú, hvussu danir taka ímóti Brandi, og um teir eru sinnaðir at keypa fløguna.

– Komandi tíðina skulu vit fyrst og fremst hugsa um at selja og promovera hesa fløguna og royna at syrgja fyri, at hon kemur víða um. Vit royna nú at leggja brenni á báli, so at login verður enn størri, tekur Steintór til.

## Stórt maskinarí

Við á fløguni hjá Brandi eru tey flestu stóru nøvnini í føroyska tónleikaheiminum. Hesi eru savnað saman at spæla og framleiða fløguna.

Steintór sigur, at tað hevur verið eitt stórt og tíðarkrevjandi arbeiði at fáa alt hetta maskinarii at koyra, tí tað eru so nógv fólk tengd at verkætlanini.

Fyri stuttum stovnaði Steintór Rasmussen saman við Eyðfinni Jensen plátufelagið Name, sum eisini stendur aftanfyri nýggju útgávuna hjá Brandi Enni. Plátufelagið er føroyskt og hevur sítt virksemi bæði í Føroyum og í Danmark. Steintór umboðar felagið í Føroyum, meðan Eyðfinn Jensen er í Danmark.

Steintór Rasmussen sigur, at tað er sera umráðandi at gera sær royndir í Danmark, tí hesar kunnu koma teimum til góðar seinni. Henda fløgan kann jú vera eitt stig á leiðini víðari út í heim.

– Vit hava eina góða vøru, og hon burdi tí fingið pláss í útvarpsstøðum og øðrum donskum fjølmiðlum, sigur Steintór at enda.